# Akraberg hevði metár í fjør

**Síðan Framherji keypti Akraberg, fyrrverandi Beinir og Skálafjall, á tvingsilssølu fyri stívliga 10 árum síðani, hevur raksturin á hvørjum ári givið avlop. – Í fjør fiskaði skipið fyri stívliga 60 miljónir kónur, og tað er besta árið higartil, sigur Anfinn Olsen, reiðari**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Høvuðsorsøkin til góða úrslitið, er, at vit flaggaðu ímillum føroyskt og íslendsk flagg – og vit høvdu góðar kvotur, sigur Anfinn Olsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Meðan flestu skipabólkar kæra sína neyð um minkandi inntøkur, hevði Akraberg sítt besta ár í fjør.

Skipið, sum felagið Framherji, keypti fyri 10 árum síðan, fiskaði í fjør fyri stívliga 60 miljónir krónur.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at árið 2004 var eitt gott ár hjá skipi og manning.

## Flaggaðu ímillum

Spurdur, hvussu tað ber til, at Akraberg hevði sítt besta ár, tá ið skipaflotin sum heild hevði minkandi inntøkur í 2004, sigur reiðarin:

– Høvuðsorsøkin til góða úrslitið, er, at vit flaggaðu ímillum, sum hann tekur til.

Anfinn sigur, at Akraberg í fjør bæði royndi undir føroyskum flaggi og íslendskum flaggi, tó allatíðina við føroyskari manning.

– Vit høvdu góðar kvotur undir føroyskum flaggi og góðar kvotur undir íslendskum flaggi. Hetta hevur tænt bæði skipi og manning, sum høvdu sítt besta ár nakrantíð, sigur hann.

## Avlop hvørt ár

Reiðarin sigur, at Akraberg hevur fiskað kongafisk undir føroyskum flaggi – og tosk í Barentshavinum.

– Undir íslendskum flaggi hava vit serliga fiskað kongafisk, tosk, hýsu og upsa.

Anfinn sigur, at manningin tískil bæði hevur verið avroknað eftir føroyskum sáttmála og íslendskum sáttmála.

– Hesir sáttmálar eru á leið teir somu, tó at tann íslendski er eitt lítið sindur lakari fyri manningina.

Síðan Framherji keypti Akraberg, fyrrverandi Beinir og Skálafjall, á tvingsilssølu fyri stívliga 10 árum síðan, hevur raksturin á hvørjum ári givið avlop.

– Men hetta er so besta árið higartil, sigur Anfinn Olsen.

## Kona og maður eru skipaeigarar

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið Framherji, sum eigur Akraberg og dótturfelagið EM-Shipping, sum eigur Høgaberg, hevði 10 ár á baki, 10. november í fjør.

Tey, sum eiga felagið Framherja, eru Anfinn Olsen, sum eigur ein triðing, konan, Elisabeth Eldevig Olsen, sum eigur ein triðing og íslendska felagið Samherji, sum eigur seinasta triðingin.

Við Akrabergi eru einir 30 mans og við Høgaberg, sum er kombineraður nóta-og trolbátur, eru 13-14 mans, tá ið teir royna við nót og 10-11 mans, tá ið roynt verður við troli.

Øll árini hevur raksturin hjá Akrabergi givið avlop og hjá Høgabergi, sum er lutfalsliga nýggjur í "familjuni", hevur raksturin eisini hingið saman.

Høgaberg liggur í løtuni á Fuglafirði, har skipið verður riggað til.

# "Messan" er í skúlastovuni

SKÚLI OG VINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fýra lærarakúlanæmingar undirvísa 3. b á Venjingarskúlanum eftir einum arbeiðshátti, sum verður róptur "storyline" – ella søgutráður*

*Mynd: Rógvi Mouritsen*

Í seinasta blaði høvdu vit myndir av einum 3. flokki, sum vitjaði umborð á havrannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni. Hetta vóru næmingar úr 3.b á Venjingarskúlanum, sum í tríggjar vikur arbeiða við ymiskum evnum, harav eitt av evnunum er fiskivinna. Tað eru fýra lesandi á Føroya Lærarakúla, ið nú ganga á fjórða og seinasta ári, sum skipa undirvísingina í hesum flokki eftir einum arbeiðshátti, sum verður nevndur "storyline" – ella søgutráður.

– Hetta er ein liður í próvtøkuni hjá okkum í pedagogikki og psykologi á Føroya Lærarakúla, sum verður í februar, siga lærarakúlanæmingarnir.

Tey siga, at 3. floksnæmingarnir í fyrsta lagi gera ein persón úr pappíri, sum verður teirra dukka á ferðini. Síðan eru børnini skipað í tvær "skipsmanningar" – ein til hvønn partrolara, ið tey eisini hava evnað til sjálvi.

– Tað var í hesum sambandi, at vit vitjaðu umborð á Magnusi Heinasyni. Her skuldu næmingarnir sjálvir síggja, hvussu eitt skip sær út, áðrenn tey fara undir at gera sítt egna skip, siga lærarakúlanæmingarnir.

Í skúlastovuni á Venjingarskúlanum eru næmingarnir eisini býttir sundir, soleiðis at manningarnar sita hvør síni megin.

– Ein søgukrókur er skipaður í floksstovuni, sum verður róptur "messan", siga lærarakúlanæmingarnir, sum leggja aftrat, at hetta er ein øðrvísi, men so sanniliga eisini áhugaverdur arbeiðsháttur.